# Føroya Kolvetni í hæddini

**Føroysku oljupartabrøvini líkjast framvegis eini góðari íløgu. Faroe Petroleum hevur merkt stóran vøkstur seinastu tíðina, meðan Atlantic Petroleum liggur stabilt um kurs 700**

PARTABRØV
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Kursurin á partabrævinum hjá Faroe Petroleum á marknaðinum í London var í gjár á 150. Tað er hægsta virðið, sum partabrævið hevur havt, síðani ódnirnar herjaðu meksikanska flógvan í fjør heyst. Ta ferðina var partabrævið heilt uppi á 165, sum er nógv tað hægsta virðið, sum felagið hevur havt.

Í verandi hækkanini hava tað serliga verið tveir lutir, sum hava spælt positivt inn – umframt støðugu útlitini fyri høgum oljuprísum, sjálvandi. Fyri lítlari viku síðani boðaði felagið frá góðu støðuni, sum felagið nú tykist vera í í Noreg. Hartil kom ársroknskapur felagsins út í gjár, og hóast eitt lítið hall, so gav hesin tað úrslit, sum leiðslan hevði sett í kortið. Og kundi felagið á tann hátt prógvað, at fyritøkan verður rikin á einum skynsamum grundarlagið.



*Marknaðurin í London hevur reagerað sera positivt upp á kunningina, sum Faroe Petroleum hevur latið virðisbrævamarknaðinum seinastu vikuna*

### Í tryggari legu

Seinastu vikurnar hevur talan ikki verið um tær heilt stóru nýggjheitirnar frá hinum føroyska oljufelagnum, Atlantic Petroleum, sum er skrásett á ICEX í Íslandi.

Hetta tykist eisini hava merkt prísin, sum støðugt hevur ligið eitt petti oman fyri teimum 700. Í øllum førum, síðani partabrævið fyri góðum mánaði síðani gjørdi satt skarvslop eftir bjartskygdu greiningina frá Eik Bank. Heilt upp móti kursmálinum hjá danska bankanum er partabrævið enn ikki komið. Men seinastu vikurnar hevur kursurin støðugt ligið beint oman fyri tey 700, og tað er væl eisini meira enn góðtikið hjá íleggjarunum.






# Íslendska ætlanin seinkað

**Ætlanin hjá íslendingum at byggja eina velduga fiskamjølsverksmiðju í Hetlandi, verður nú seinkað. Áðrenn nakað loyvi verður givið, vilja myndugleikarnir kanna, hvørji møgulig umhvørvisárin kunnu standast av slíkari verksmiðju**

VINNULÍV
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Íslendingar hava seinastu tíðina arbeitt við at gera eina stóra fiskamjølsverksmiðju í Hetlandi. Fyri einar 100 mió kr. ætlar íslendska Síldarvinnslan at byggja eina stóra verksmiðju á Sullum Voe. Samstundis vilja lokalu myndugleikarnir á staðnum nýta góðar 60 mió kr. til havnaútbygging, soleiðis at rúm verður fyri stóru nótaskipunum, sum ætlandi skulu avreiða á staðnum. Ætlaða framleiðslan hjá virkinum verður søgd at vera 100.000 tons av fiskamjøli um árið.

Men hóast kommunalu myndugleikarnir hava verið positivir mótvegis ætlanini, so er eisini ávís mótstøða at hóma.

Friðingarmyndugleikarnir hava nevnliga staðfest, at tað kemur ikki upp á tal at byggja slíka verksmiðju, fyrr enn møgulig umhvørvisárin eru kannað.

Økið kring Sullom Voe er friðað – millum annað vegna serstaka fuglalívið á staðnum. Sagt verður, at ein slík verksmiðja væl kann oyðileggja náttúrliga fuglalívið á staðnum, tí hópur av øðrum fuglasløgum helst fer at blanda seg, verður ein slík verksmiðja bygd. Hartil er eisini ætlanin at kanna, hvussu ein slík verksmiðja fer at ávirka umhvørvis- og ljóðdálking á staðnum.

Umboð fyri hetlendsku myndugleikarnar siga, at íslendska felagið í fyrsta lagi kann rokna við svari tíðliga í summar.

Roknað verður við, at verður íslendska ætlanin veruleiki, kann hetta gerast ein heilt álvarslig hóttan móti eitt Havsbrún í Fuglafirði.